# Fleiri føroysk skip enda á svartalista



*Í framtíðini kann tað als ikki útihýsast, at vit fara at melda reiðarar, sum hava síni viðurskifti í rættlag, sigur Jan Højgaard. Hann sigur, at Fiskimannafelagið er til reiðar at seta hart ímóti hørðum og skipini verða eisini løgd, verður tað neyðugt*

**Fiskimannafelagið hóttir nu við at senda løgregluna eftir fleiri reiðarum og at seta teir á svartalista so at teir ikki fáa manning til skipini. Støðan er so hættislig, at hetta kann enda við kríggi, sigur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum**

FISKIMENN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta kann enda við beinleiðis kríggi ímillum fiskimannafelagið og reiðarar.

Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag leggur ikki fingrarnar ímillum.

Tað eru nakrir føroyskir reiðarar, sum als ikki virða manningarnar og sum fara við teimum, akkurát sum tað passar teimum.

Hann sigur, at hetta merkir, at tað kemur ferð eftir ferð fyri, at ávísir reiðarar als ikki vilja halda sáttmálan.

Men tað skal steðgast, staðfestir formaðurin í Fiskimannafelagnum.

- Og vit fara at gera tað, sum krevst fyri at steðga hesum. Vit eru eisini til reiðar at leggja skipini, verður tað neyðugt, at taka reiðarar ikki betri partar fyri seg, kann hetta enda við rættiligum kríggi ímillum reiðarar og Fiskimannafelagið, hóttir Jan Højgaard.

## Enda á svartalista

Fyribils hevur Fiskimannafelagið nú givið nøkrum reiðarum ávaring um, at halda teir fram at bróta sáttmálan, verða teir settir á ein svartalista.

Fiskimannafelagið hevur fyrr hótt við at gera ein svartalista við reiðarum, sum ikki halda sáttmálan við Fiskimannafelagið.

- Og nú eru nakrir reiðarar ávaraðir um, at teir eru í ferð við at enda á einum svartalista.

Ætlanin er at almannakunngera hendan svartalistan fyri at kunngera fyri sjófólki, hvørjum reiðarum tey skulu halda seg frá, tí at teir virða ikki sáttmálarnar.

Men hetta verður eisini gjørt fyri at reinsa allar teir mongu reiðararnar, sum halda sáttmálin so at ikki teir skulu liggja undir illgruna fyri at bróta rættindini hjá manningunum.

- Nógv teir flestu reiðararnir eru fyrimyndarligir arbeiðsgevarar og vita ikki alt tað góða, teir skulu gera fyri fólkið hjá sær og tað er órættvíst, at teir skulu koma undir ringt umdømi, tí at nakrir fáir ikki virða rættindini hjá manningunum, sigur Jan Højgaard.

Jan Højgaard vil ikki siga, hvussu nógvir reiðarar hava fingið ávaring, ella, hvørjir teir eru.

Men talan er bæði um fiskiskip og ferðamannaskip, staðfestir hann.

## Skuldu siti í geglinum

Hann sigur, at í veruleikanum vildi hann ikki trúð, at støðan var so vánalig, sum hon er.

- Eitt vanligt sáttmálabrot er, at hýran verður ikki goldin til tíðina. Manningin skal hava løn í seinasta lagi tvær vikur eftir at skip hava avreitt, men í ávísum førum kunnu tað ganga mánaðir áðrenn teir fáa lønina.

- Tað er er eisini vanligt, at reiðarar ikki betala frítíðarløn, trygging og eftirløn, sum teir eiga eftir sáttmálanum.

- Ístaðin stinga teir pengarnar í sín egna lumma. Hetta er rætt og slætt svik og reiðarar, sum gera slíkt, áttu at verðið settir í geglið, sigur Jan Højgaard.

Hann sigur, at tá ið manningarnar fáa uppgerðirnar stendur á teimum, at tryggingar og øll gjøld eru goldin og tí eru menninir í góðari trúgv.

- Men so kann koma undan kavi eitt ár seinni, at tað eru tey ikki kortini og tað er rættiliga álvarsligt, tí tað setir fiskimenn í ein ringa støðu, skuldi tað hent, at teir koma til skaða.

Jan Højgaard sigur, at Fiskimannafelagið hevur í ávísum førum verið noytt at stevnt reiðarum fyri at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

- Men í veruleikanum er talan um brot á revsilógina, tí hetta er svik. Sostatt er hetta í veruleikanum talan um politimál og tað kann als ikki útihýsast, at reiðarar, sum ikki hava hesi viðurskifti í rættlag, verða meldaðir til løgregluna í framtíðini, sigur formaðurin í Fiskimannafelagnum.

## Sosialurin í morgin:

## Ódámlig framferð

**Nýggi formaðurin í Fiskimannafelagnum hevur lagt eina nýggja linju, men framferðin er eitt sindur ódámlig, heldur formaðurin í Reiðarafelagnum, Jákup Sólstein.**

**- Tað er ikki gamalt í Føroyum at hótta við at seta fólk á svartalista. Hann kennir onki til, at tað er vanligt, at sáttmálar verða brotnir, men hendir tað, plaga tað at verða avgreitt í øllum góðum, uttan at tað hevur verið neyðugt at hótta við bæði báli og brandi.**








PARTABRØV BÍÐA EFTIR ROKNSKAPUM

Allan juni mánaða lógu partabrævamarknaðir og sveiggjaðu rættiliga nógv, men komu tá samanum kom ikki úr stað. Hetta er skilligt, tá hugsað verður um tað høga stig, partabrøv eru hækkaði til hetta ið farið er av árinum. Í ár eru partabrøv í Evropa hækkað 8% og í USA 7%. Hetta eru ikki so øgiliga stórar hækkingar fyri 6 mánaðir, men tað er áhugavert, at marknaðirnir bæði í USA og Evropa eru sera tætt við tann toppin, sum var í 2000.

Tá partabrøv nærkast stigum, har tey áður hava vent, er vanligt at tey steðga á eina tíð. Tað er hetta, vit síggja í løtuni. Av tí at tey eru hækkaði nógv seinasta árið ella tvey, er eisini møguleiki fyri, at tey lække eitt sindur, áðrenn tey aftur nærkast hæddunum. Í løtuni verður bíðað við spenningi eftir hálvársroknskapunum, sum koma í næstum.

GJALDOYRU

Dollarin nærkast aftur 5,30, sum er tað veikasta mótvegis krónuni síðan 1995. Hann hevur bert einaferð verið niðan fyri 5,00, og tað var í 1978. Tað eru millum annað spekulatiónir um, at nógvir amerikanskir lántakarar ikki kunnu rinda sínar skyldur, sum gera um seg á gjaldoyramarknaðinum.

LÁNSBRÆVARENTUR STØÐUGAR

Lánsbrævamarknaðurin er enn støðugur. 10-ára rentan hevur seinastu 3 vikurnar sveiggjað millum 4,58%-4,78%. Marknaðurin er í løtuni stuðlaður av spekulatiónum um amerikansku lántakararnar, sum møguliga fara á húsagang.

HESA VIKUNA

Hetta verður væntandi ein hendingarík vika á marknaðunum. Tað verða kunngjørd ein rúgva av týdningarmiklum hagtølum, umframt at ECB hevur rentufund. Hesar hendingar kunnu allar flyta marknaðirnar.

Vísital fyri norrøn partabrøv




Donsk 10-ára renta




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1456,95 | + 1,05% |
| Alheims partabrøv | 8826,17 | + 0,18% |
| Atlantic Petroleum | 1100,00 | + 2,33% |
| Føroya Banki | 232,00 | -5,11% |
| KB Trygg Eurostoxx | 110,98 | -0,04% |
| USD | 546,24 | -1,16% |
| JPY | 4,46 | -0,15% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK